# Týr spældi uttan Terja

**Leygarkvøldið spældi rockbólkurin Týr til konsert í Keypmannahavn, men annar gittarspælarin manglaði**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tað gekk væl hjá Týr, tá ið bólkurin spældi á eini lítlari konsert í Keypmannahavn leygarkvøldið. Tveir aðrir bólkar spældu eisini.

Týr plagar at hava fýra tónleikarar á pallinum, men hetta kvøldið manglaði annar av gittarspælarunum. Tað lá ikki fyri hjá Terja Skipanes at vera við, og tí var Heri Joensen, sum eisini er sangari, einsamallur gittarspælari.

Fyriskiparin av konsertini, Rocket Club, var væl nøgdur við Týr og var áhugaður í at fáa teir at spæla á onkrari størri konsert seinni.

Fløgan hjá Týr verður støðugt ummæld í útlendskum tíðarritum, og nú hava onkur góð ummæli verið í Týsklandi, har Týr eisini selir nakað av fløgum.



*Heri Joensen var einsamallur um at spæla gittar í Týr um vikuskiftið:*

*Jens Kr. Vang*




## Limbo á Platform

Tað verður sum at koma á strondina sunnanfyri, tá ið fólk koma á gátt á dansistaðnum Platform um vikuskiftið.

Har verður nevniliga gjørt nógv burtur úr at fáa ein karibiskan stemning við pálmum, sandi, parasol og øðrum.

Og so verður kappast í limbo-dansi – »How low can you go«. Vinnarin av hesi kapping vinnur ein flogferðaseðil frá Maersk Air.

Tað verður ein danskur plátuvendari, sum fer at standa fyri undirhaldinum, og DJ The Bad Wolf fer at spæla blandaðan dansitónleik – nýggjan og eldri.

Tiltakið er bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

## Havnar Hornorkestur hevur konsert

**Leygardagin 20. september fer Havnar Hornorkestur at hava konsert í høllini á Læraraskúlanum í Havn.**

*Tíðindaskriv*

Sum kunnugt hevur Havnar Hornorkestur 100 ára jubileum í ár, og konsertin hesaferð er eisini liður í 100 ára-haldinum. Í samband við tað hevur orkestrið havt vitjanir av útlendskum solistum og orkestrum, og soleiðis verður eisini hesaferð. Anders Nyqvist úr Svøríki, sum spælir trompet, fer at spæla saman við orkestrinum og millum annað fer hann at spæla Slaviska Rapsodi av tónaskaldinum Carl Höhne. Orkestrið eigir eisini sínar egnu solistar, og til konsertina 20. september fer Andras Olsen at spæla eina trombone-solo av Eric Cook, sum kallast Bolivar. Sum navnið bendir á, so er talan um eitt verk við íblástri frá latínamerikanskum tónleiki. Annars verður eisini nógvur annar spennandi tónleikur á skránni – tildømis Beatles-løg, eitt verk av amerikanska tónaskaldinum James Curnow, sum kallast Blenheim Flourishes, ein marsjur av Richard Wagner og mangt annað. Orkestrið telur umleið 30 spælarar, og dirigentur er Ove Olsen.

Konsertin verður leygardagin klokkan 16 í høllini á Læraraskúlanum. Hon verður ein góðan tíma til longdar við einum stuttum steðgi.

**Anders Nyqvist:**

Svensktföddi Anders Nyqvist byrjaði at spæla trompet sum 10 ára gamal. 19 ára gamal fekk hann eitt stipendium frá Hong Kong Academy of Performing Arts. Eftir at hava lisið har í trý ár, fór hann til England at lesa í 2 tvey ár á Royal Academy of Music í London. Anders arbeiðir nú við nøkrum av teimum størstu orkestrum og bólkum í Evropa, tá hann ikki gevur solokonsertir og hyggur eftir fótbólti.

**Andras Olsen**

Okkara egni Andras Olsen er føddur 1978. Eftir at hava tikið studentsprógv fór Andras at lesa tónleik við konservatoriið í Århus, og seinni fór hann til England at lesa í 2 tvey ár á Royal Academy of Music í London. Nú arbeiðir Andras sum solistur og í bólkum kring alt Evropa. Andras skal tey næstu tvey árini lesa á solistlinjuni í Keypmannahavn.

# ítróttur

Nr. 167 • fríggjadagur • 5. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tór-Ingar tekurt tað róligt

**Enn eigur Tór-Ingar Akselsen fyrsta veruliga landsdystin á, men tað kundi hent seg, at hesin kemur leygardagin**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk*

**Sosialurin, Glasgow:** Seinasti maðurin, sum legði afturat landsliðshópinum var Tór-Ingar Akselsen, sum týskvøldiði varð biðin um at pakka ferðataskuna. Hetta kom sjálvandi nakað óvart á unga HB-leikaran, men vónin um enn eina úttøku hevði tó alla tíðina verið til staðar.

– Sjálvandi vónaði eg alla tíðina, at eg eisini slapp við hesaferð. Men tá eg so ikki var í hópinum, sum varð kunngjørdur, so hevði man líka sum slept tí tankanum. Men tað er sjálvsagt hugaligt at vera við aftur, heldur hann.

### Sum tað kemur

Seinasta góða árið ella so, so hevur Tór-Ingar ofta verið nevndur í landsliðshøpi, og nú tykist tað eisini, sum er hann um at fáa fótin fyri seg í hópinum. Ivaleyst sum eitt úrslit av góða spælinum, sum hann nú tykist sýna fyri HB hvørt vikuskifti.

Júst tað, at leikarin tykist vera sera væl fyri í løtuni, ger kanska eisini, at summi rokna við at síggja hann í dysti fyri landsliðið hampuliga skjótt, men hetta tykist leikarin sjálvur tó at taka heilt róliga.

– Tað vóni eg sjálvandi, at eg sleppi, men hinvegin havi eg ikki gjørt mær nakrar tankar um tað sum so. Tað er jú eitt sindur av muni á Gundadali og so einum fullsettum leikvølli her niðri, men tað má so bara koma, sum tað kemur, sigur altso Tór-Ingar Akselsen at enda.

*– Tað er jú eitt sindur av muni á Gundadali og so einum fullsettum leikvølli her niðri, heldur Tór-Ingar Akselsen*



## Nýggjur maður á liðnum

**Tað er ikki bert millum leikararnar, at skifti verða gjørd. Eisini á leiðarasíðuni er eitt nýtt andlit komið á fótbóltslandsliðið**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*

**Sosialurin, Glasgow:** Tað fór kanska heldur stillisliga framvið, men ein spildurnýggjur maður var við í landsliðshópinum, tá Føroyar leiktu heimadyst ímóti Íslandi.

Tað var tó ikki millum leikararnar, at hesin nýggi maðurin var. Kári Nielsen var nevnliga millum hjálparmenninar á liðnum ta ferðina, og nú skotlandsferðin stendur fyri framman, er hann eisini við, so hann er helst spakuliga um at fáa fast pláss í hópinum.

Heilt ókend er støðan tó kanska ikki fyri Kára. Núverandi hjálparvenjarin hjá HB taldist í nógv ár millum fremstu leikararnar í landinum, men í altjóða høpi rakk hetta tó ikki so langt. Einamest tí hetta var áðrenn altjóða limaskapin hjá FSF, og at landsliðsaktiviteturin tí var avmarkaður til onkran hendinga dyst móti Hetlandi og Íslandi. Kári var eisini partur í onkrum av hesum, og okkurt málið bleiv tað eisini til tá.

### Alt skal vera í lagi

Spurdur, hvørt nýggi leiklutur hansara á landsliðnum er ein avbjóðing sum so, ella um talan heldur er um okkurt slag av fjølbroytni, so heldur Kári sjálvur, at tað kanska eins nógv er tað seinna.

– Men so er tað sjálvandi eisini tað, at tú her hevur møguleikan at síggja, hvussu tingini fungera á tí hægsta stignum, sum okkara fótbóltur hevur at bjóða. Tað er jú eisini við til at geva nýggjan íblástur, tí tú sært kanska, at tingini verða gjørd øðrvísi.

Uppgávan hjá liðleiðarunum í hesum er so at syrgja fyri, at leikararnir ikki skulu hugsa um nakað annað, enn sjálvan fótbóltin. At allir karmarnir kring liðið eru júst soleiðis, sum teir eiga at verða.

Sjálvar venjingarnar hava Kári og Birgir kanska ikki so nógv við at gera, men hinvegin er einki at ivast í, at royndirnar hjá Kára kunnu vera hentar, um ein leikari hevur tørv á nøkrum góðum orðum.

– Tað er so ikki nakað, sum eg hugsi so nógv um, men um eg eisini kann hjálpa til á tann hátt, so er tað bara gott. Men sjálvandi práti eg eisini við leikararnar. Teir úr HB kenni eg jú heilt væl, og tað er jú eisini stuttligt at læra hinar at kenna. Men eg kann so ikki siga, at eg havi nakra serliga funktión í so máta.

### Gott ferðalag

Sum nevnt, so er hetta bara onnur ferðin, at Kári er í nýggja starvinum. Enn hevur hann sum so ikki gjørt sær nakrar um, hvørt hetta skal verða fastur táttur framyvir, men tað tykist hinvegin ikki vera ein tanki, sum hann hevur nakra serliga andstygd fyri.

– Tað var jú mín góði vinur, Birgir (Hansen, blðm.), sum heitti á meg at koma við, og hann plagar at vera hugnaligur at hava við sær. Og skal metast eftir, hvussu leingi hesir ymsu hava verið við, so tykjast teir at halda hampuliga leingi, so hvør veit.

– Tað er nokk heldur einki at ivast í, at leiðararnir kring liðið duga at hugna sær saman. Ikki minst er kortspælið ein týdningarmikil partur her, og tað verður gingið inn fyri sakini. Ein gul føraratroyggja er til tann, sum liggur fremstir í samlaðu støðuni, so um tit síggja onkran av leiðarunum ganga í gulari troyggju á ferðunum, so vita tit hví, sigur Kári, sum tó sjálvur eigur tann partin av landsliðsferðini til góðar.

